# – Eg sá at eg eisin



*Lív svarar spurningum um tænastu sína, sum bróðir hennara John í Skemmuni setti henni*

Lív Poulsen úr Porkeri hevur altíð lurtað við áhuga, tá trúboðarir vitjaðu samkomuna. - Teir tosaðu um at tørvur var á trúboðarum. Men sjálv ætlaði eg mær ikki avstað, sigur hon. Í farnu viku fór hon kortini til afrikanska landið Senegal, har hon í framtíðini fer at virka sum trúboðari

KRISTNIBOÐAN
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Porkeri – Senegal:** – Tað var tá eg arbeiddi á einum lítlum sjúkrahúsi í Gambia, at eg fekk eyguni upp fyri tí stóra tørvinum á trúboðarum í Vesturafrika.

– Eg sá nú, at eg eisini kundi gera mun her, sigur Lív Poulsen, trúboðari, sum í Senegal fyrireikar seg til eina tænastu sum trúboðari í hesum landinum.

Hon hevur royndt ymiskt á leiðini til tað nýggja og ókenda, sum nú stendur fyri framman. Hon hevur verið í Ísrael, verið volontørur á einum barnaheimi fyri menningartarnað, hevur arbeitt á Eirargarði og hevur útbúgvið seg til sjúkrasystir.

Síðani hevur hon arbeitt sum sjúkrasystir í Havn, Danmark og á Tvøroyri, inntil hon í 1999 fór til Gamiba at arbeiða sum sjúkrasystir á einum lítlum sjúkrahúsi í 14 mánaðir.

Tað var her at hon veruliga fekk eyguni upp fyri neyðini og tørvinum í hesum landinum. Og nú – seks ár seinni – er hon afturkomin til Senegal, har hon í lýdni bíðar eftir teirri uppgávuni, sum Hann, ið sendi hana hagar, skal vísa henni.

Áhugavert er at nevna, at fyri fáum árum síðani varð ein onnur kvinna úr Porkeri og maður hennara send út sum trúboðarar. Tað eru hjúnini Maureen og Christopher Clarke, ið virka sum trúboðarar í Norðurafrika.

## Mentan og siðir

Lív fór úr Føroyum í farnu viku og skal verða í Senegal teir komandi fýra til seks mánaðirnar.

Henda tíðin er ein fyrireikingartíð til ta víðari tænastuna, og umfatar m.a. at hon skal læra seg eitt nýtt mál, ið kallast woolof.

– Eg skal tó ikki læra hetta málið til fulnar, men bara so at eg kann klára meg í tí dagliga – t.d. tá eg farið á marknaðin at keypa ella um eg skal spyrja um veg, sigur Lív.

Henda undirvísingin er skipað við lesnaði, men eisini við praktiskum arbeiði, har Lív kemur at vitja fleiri støð, har fólkið tosar hetta málið. Á henda hátt fær hon møguleika at royna tað hon hevur lært frammanundan, umframt tað at hon soleiðis fær gott innlit í mentan og siðir hjá fólkinum.

Enn veit Lív kortini ikki til fulnar, hvat hennara arbeiði kemur at vera, tá tænastan av álvara byrjar í Senegal.

– Men júst gjøgnum hesar vitjanirnar á mongum ymiskum støðum, vóni eg so at kunna síggja, hvar brúk er fyri mær, og hvar eg kann gerast mestan mun, sigur hon.

## Týða Bíbliuna

Hóast Lív er útbúgvin sjúkrasystir, so er tað kortini eitt heilt annað øki, ið hevur hennara áhuga: Týðing av Bíbliuni.

Í dag er støðan tann, at ein rættiliga stórur partur av heimsins fólkasløgum ikki enn hava eina heila Bíbliu á teirra móður-



# Útsending við heilsan og bøn

**Porkeri – Senegal:** Bilar í hópatali standa parkeraðir allastaðni í bygdini hetta leygarkvøldið. Í missiónshúsinum savnast fólk til missiónsviku, men í samkomuhúsinum "Betania" er eisini missión á skránni.

Fólk úr allari oynni eru samankomin at vera saman við teirri 31 ára gomlu Lív Poulsen, sum hetta kvøldið verður send út sum trúboðari til afrikanska landið Senegal.

Í gongini verða fólkini møtt við vøkrum sangi frá sangkórinum úr oynni, og tá tey eru liðug at syngja kann sjálv útsendingin byrja.

Nógv fólk eru samankomin, bæði ung og eldri, tí tað er ikki gerandiskostur, at ein trúboðari verður sendur so langa leið sum til Afrika.

Øll vilja tey samgleðast og vísa sín stuðul, nú fyrireikingarnar til ta longu ferðina eru at enda komnar. Tveir dagar seinni skal hon úr Føroyum og út í heim.

Skal ein bera eina heilsu fram til henda trúboðaran, so má tað vera nú!

## Álvarsom løta

Tað er ein serstakur dámur yvir eina slíka fráferðarsamkomu. Og tað skilst á fólki, at hetta eisini er ein álvarsom løta fyri hesi trúgvandi systkin hennara.

Løtan byrjar við at Mikkjal Sørensen hevur eitt orð og biður síðani eina bøn.

Eftir ein felagssang er samrøða á skránni. Bróðir Lív, John í Skemmuni, sum er í fulltíðar tænastu í Føroyum, setur fram spurningar til Lív um ta tænastuna, sum nú liggur fyri framman.

Símun í Túni, sum er leiðari fyri felagsskapin New Tribes Mission, hagani Lív verður send út frá, ber síðani fram ein boðskap, áðrenn løtan er komin til tær serstøku heilsanirnar frá útvaldum fólkum.

Frá samkomuni Ebenezer í Havn bar Osvald Kjærbo fram heilsu, meðan fólk frá fýra samkomum í Suðuroynni somuleiðis bóru fram heilsur: Samkoman á Tvøroyri er umboðað av Hildigarð Jacobsen; samkoman í Hvalba av Jens Sofus Thomsen; samkoman í Vági av Kára Hammer og samkoman í heimbygdini av Porkeri av Jastrid Sørensen. Hennara heilsan er at lesa aðrastaðni á hesi síðuni.

Forbøn fyri Lív er somuleiðis á skránni, og fyri hesi stóðu Pidda Larsen úr Porkeri, Róald Norðberg úr Vági og Andrew Thomsen úr Porkeri.

Løtan í møtisalinum endaði við at Lars Djurhuus úr Porkeri endaði við bøn, áðrenn felagskórið sang sín seinasta sang.

Aftaná var hugnaløta við einum drekkamunni har enn fleiri nýttu høvið at at koma við góðynskjum til Lív.

# – Far n

Í sambandi við útsendingina av Lív sum trúboðara til Senegal hevði Jastrid Sørensen úr samkomuni Betania í Porkeri eisini nøkur góð orð til Lív.

Hon las fyrst nøkur ørindi úr 2. Móesbók kap. 33:

- Síðani segði HARRIN við Móses: „Far nú avstað -
- HARRIN talaði við Móses andlit til andlit, sum táið maður tosar við mann.
- Móses segði við HARRAN: Er tað nú so, at eg havi funnið náði fyri eygum Tínum, so vís mær vegir Tínar, so eg kann kenna Teg og finna náði fyri eygum Tínum! Hugsa kortini um, at hetta fólkið er Títt fólk!"
- Hann svaraði: „Skal Eg tá sjálvur koma við tær og leiða teg til hvílu?"
- Tá segði Móses við Hann: „Kemur Tú ikki sjálvur við, so lat okkum ikki fara avstað hiðani!
- Tí av hvørjum skal tað síggjast, at eg havi funnið náði fyri eygum Tínum, eg og fólk Títt, um ikki av tí, at Tú ferðast við okkum, so vit, eg og fólk Títt, verða ærd fram um øll fólkasløg á jørðini!"
- HARRIN svaraði Mósesi: „Eisini hatta, ið tú nú biður um, skal Eg gera; tí tú hevur funnið náði fyri eygum Mínum, og Eg kenni teg við navni."

Góða Lív!
Við hesum orðum senda vit í samkomuni her, tær